
Kreppan klórar


Gerið Borðoyarv9k til eina risaalistøð fyri toskayngul, skrivar »Ongul«

Tá okkara danska brøðrafólk sigur: »Krisen kradser«, so liggur tann veruleikin aftanfyri, at millum 200 og 300 túsund eru arbeiðsleys. Men danskarar royna eisini at gera nakað við tað. Teir royna at spara bæði alment og privat, og teir royna at finna nýggjar framleiðsluvørur og nýggjar marknaðir.

Tann føroyska kreppan er ung og bragdlig, fyllir ár á ólavsøku. Hon klórar djúpt. Fólk tykjast lamsligin, og myndugleikarnir liggja í coma.

Skal sjúklingurin Føroyar fáast aftur á føtur, so má diagnosan stillast — psykologiskt, politiskt og økonomiskt.

Dansurin hjá teimum gyltu olmussudýrunum um lánkálvin

Psykologiskt sær tað soleiðis út: Fram til 1874 vóru vit bara »det fattige Folk udi Færø«. Fram til u.l. 1950 vóru tær gomlu dygdirnar enn livandi. Fólk dugdu at seta tering eftir nering. Frá u.l. 1960 byrjar tann føroyska brúkitíðin, spanderitíðin, oyðslitíðin. Tað ráddi um at keypa og brúka og blaka burtur. Fiskanøgdirnar vuksu, fiskaprísirnir hækkaðu, og olmussan frá donskum arbeiðarum til føroyskar tjóðskaparhetjur vaks til 800 milliónir krónur um árið. Det fattige Folk udi Færø fór at vaða í pengum. Eingin tyktist gruna, at aðrar tíðir kundu koma. At vit mistu fjarleiðirnar, tá fiskimørkini fóru út á 200 fjórðingar, mátti verið eitt varskó. Men oyðsliorgiið helt fram, líka til ta minniligu ólavsøkuna 1989, tá vit vaknaðu við kaidan dreym.

Gjara út av læntum pengum

Politiskt tykist semja vera um, at tey skiftandi stýrini hesi seinastu 20 árini hava skipaði í oyðslidansinum. Stýrini hava hugsað meira um at gjara út enn at stýra. Tað hevur ført til karrikaturar sum luftholini í Kalsoynni, undirsjóvargalskapin í Vestmannasundi, vatnhøvdaprojektið Gomlurætt og keyp og bygging av svartkjaftatrolarum og øðrum trolarum, sum onga aðrastaðni hava trolað enn í landskassanum, t.e. í fólksins pengapungi. Krúnan bleiv sett á vatnhøvdið, tá tær óneyðugu milliardirnar frá teimum donsku kredittfeløgunum streymaðu inn í landið í 1986-87.

Toska-imperialistarnir

Økonomiskt hendi tað stóra umskiftið, tá vit fóru frá húki til trol. Rættilig ferð kom á, tá teir nýggju stórtrolararnir komu í 1949 og fram. Føroyingar gjørdust imperialistar, toska-imperialistar, sum sigldu Norðuratlantshavið upp í skúm. Okkara fiskimenn løgdu nógv fyri. Ófatiliga stórar nøgdir av fiski komu upp á land, og tilsvarandi smáar nøgdir vóru eftir í havinum.

Tað bleiv til eina trolarasjúku. Vit hildu fram at keypa trolarar — og lótu teir harafturat sleppa at planera landgrunnin! Hetta gjørdu vit, hóast øll tekin vóru í sól og mána um, at *troltíðin var av.* Tann imperialistiska og ekspansionistiska rúgvutíðin er farin, og hon kemur ongantíð aftur.

Nú ræður um at hugsa intensivt

Tann nýggja tíðin krevur, at vit fara frá kvantiteti til *kvalitet*, frá ekstensiviteti til intensivitet, selektivitet og høgt virkingarstig. Tann nýggja tíðin krevur, at *landgrunnurin og Føroya banki verða røktir sum urtagarðar.* Her verður øll troling forboðin straks, og skundað verður undir útróður við smærri og bíligum skipum, sum royna við línu og snellu.

Samstundis verður farið undir umfatandi framleiðslu av toskayngli til at sleppa út í havið. Lond sum Japan og Danmark (Hvide Sande) eru longu farin undir hetta. Toskur er kannibalur, hann etur sítt egna slag, siga teir tortrúnu, men hegnið er uppfunnið, og verður ein milliard av yngli slept út, og onnur helvtin etur hina helvtina, so eru jú 500 milliónir toskar eftir. Tað er vert at taka við í hesum tíðum.

Uppskot: Borðoyarvík verður gjørd til risaalistøð fyri toskayngul og annan yngul, sum hevur virði.

— Tú skalt røkja tín urtagarð, segði Voltaire.

Ongul


HM-TILBOÐ


Every game — every goal — every minute — we won't miss a kick . . .

Meðan HM er, ber ikki til at síggja fótbólt og Dag og Viku samstundis.

Vit hava loysnina

Verandi kundar kunnu í hesum tíðarskeiði gera nýggjan leigusáttmála um sjónvarp no. 2 fyri 2/3 av vanligari leigu.


Týsk styrki . . .


SABA®

. . . — Týsk dygd

»Ma ma ma ma má á á á á á á á k«

»Gott kvøld — her eru vit við Degi og Viku«

DER VIDEO HI-FI-TV
Niels Finsensgøta 12 · Tlf. 151 32
hevur sjónvørp til leigu

Lýsið í **sosialinum**

Bátur til sølu

Lítið brúktur 22 fót glastrevjabátur av slagnum Helle við 31 hk. Solé motori, VHF og 3 snellum til sølu.

BEHGRA - MEKLING
Tlf. 19470 - Telefax 19830